# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Sjálvandi nýggjan musikkskúla

Skilafólk hava í eina tíð arbeitt við at gera uppskot til nýggjan musikkskúla í Havn. Ætlanin varð løgd fram í morgun. Okkara greiða niðurstøða í hesum máli er: fáið henda skúla upp at standa sum skjótast. Við undantaki av ítróttinum er neyvan nakað tiltak her á landi, ið hevur slíkt gróðurfesti í føroyinginum sum tónleikurin. Hetta eru vit so eisini vitni til hvønn tann einasta dag – í miðlunum, á konsertum og tiltøkum sum heild kring landið alt.

Og hvat er meira náttúrligt fyri eina fjarskotna tjóð sum okkara, at tónleikurin eigur eitt týðandi pláss hjá okkum øllum so ella so! Vit plaga at siga, at vit eiga heimsins vakrastu náttúru. Vit kundu eins væl sagt, at vit eiga heimsins mest tónleikaelskandi fólk. Takið mongu tónleikabólkarnar, kórini, dansifeløgini, hornorkestrini fyri bert at nevna nøkur. Takið fløguútgávurnar og mongu konsertirnar. Alla staðni er tónleikurin so sprelllivandi, so náttúrligur partur av gerandisdegnum hjá so mongum av okkum, antin vit sjálvi spæla ella syngja ella bara lýða á. Tað er m.a. í hesum ljósi, at vit skulu síggja tað frálíka uppskot, ið nøkur av okkara frægu tónlistafólkum hava tikið stig til. Her er vissuliga gjørt eitt forarbeiði, sum okkara politikarar kunnu fegnast um.

Sjálvandi er musikkundirvísingin fyrsta stigið, tað er har vit skulu leggja nakað gott niður í børnini og ungdómin - komandi ættarliðið av tónleikarum og tónlistafólki. Sjálvt grundfestið, grundarlagið er so avgerandi fyri tónleikaframtíðina. Og her hevur ein musikkskúli so ómetaliga stóran týdning. Eitt er at hava góðar lærarar. Annað er at hava góðar umstøður. Uttan hesi bæði er eingin framtíð hjá okkara ungdómi hvat tónleiki viðvíkur. Vit skulu tó ikki gloyma tær eldsálir, sum hava roynt at stuðla tónleikaglaða ungdóminum, ein teirra, Karl Anton Klein, sáli arbeiddi í longri tíð at fáa ungdóminum hóskandi umstøður at venja og framføra tónleik. Hesi tingini eru partur av somu søk. Musikkskúlin er sjálvt tað primera grundarlagið undir øllum hinum, og tí má tað vera í lagi. Tað er tað ikki sum er. Tí skal tað vera okkara ráð til politikararnar, bæði lokalt og á landsplani: takið undir við hesum uppskotinum, ið skal koma øllum børnum og ungum í Føroyum til góða. Gott í tykkum at enn ein eldsál, Ólavur Hátún fekk virðisløn fyri sítt ærliga og slóðbrótandi arbeiði til frama fyri tónleikaundirvísingini.

**Sosialurin**

# Viðmerking til oddagrein í Dimmalætting 6. november 2006


ÆTTING:
1878
i: Ingi Samuelsen
P/F Dimmalætting
entmiðstøðin

AVGREIÐSLA:
Mánadag til hósdag
kl. 8.00-16.00.
Fríggjadag kl. 8.00-15.30.
Tlf. 341200 Fax 341201

ODDAGREIN

Smyrilsvegur 13,
Postboks 3019
FO-110 Tórshavn

T-POSTUR:
redaktion@dimma.fo
lysing@dimma.fo
haldari@dimma.fo
bokhald@dimma.fo

Deyðadómurin

o fall fyrsti dómurin yvir fyrrverandi irakiska einaæðisharran, Saddam Hussein: Dømdur at heingjast.

Einki óvæntað var í tí dóminum. Saddam var við akska rættin dømdur fyri at hava dripið so at siga a heila bygd – 148 shiamuslimskar íbúgvar – sum nd fyri at onkur royndi einaræðisharran eftir um.

ýkt skal geva strangastu revsing, og sambært kum rætti, er tað lívið.

óast dómurin væntandi bara er tann fyrsti av ri deyðadómum, sum Saddam kann vænta sær, var stór frøi á irakskum ríkisborgarum, kanska liga teimum túsundtals, sum í nógv ár hava búð gd.

liga fekk einaræðisharrin tann dóm, hann uppiborið, var boðskapurin hjá flestu irak-

varð fríðað fyri Saddam Hussein og hevur alt annað enn friður

verið í landinum. Hetta einamest av tí at tað er eitt standandi stríð í Irak millum tvær ymsar greinar av muslimsku trúnni.

Saddam hoyrdi til annan partin, og himpraðist ikki við at revsa muslimar úr hinari greinini, og í dag er tað tann fyrr so kúgaði parturin av muslimunum, sum situr við valdið.

So leingi hetta er støðan í landinum, verður neyvan friður aftur, og uppgávan at innføra demokrati og fólkaræði eftir okkara modelli í landinum kann tí tykjast møtimikil fyri ikki at siga óyvirkomilig.

Alt bendir tó á, at fyrsta forðingin, nevniliga persónurin Saddam Hussein, nú verður beindur av vegnum. Tað er nú so at siga púra vist, at Saddam verður avrættaður fyrr ella seinni. Skuldi hann sloppið undan hesum fyrsta dóminum við at kæra hann, so bíðar tann næsta deyðarevsingin eftir honum.

Tað vit kunnu kjakast um heima á okkara breiddarstigum er, hvørt tað er rætt at døma mannin til deyða. Eitt er púra vist. Í Irak er neyvan nak

setir spurnartekn við um ein maður, ið er dømdur sekur at hava dripið eina heila bygd, skal drepast. Har er deyðarevsing vanlig.

Í okkara parti av heiminum eru vit ímóti deyðarevsing og hava stórt sæð verið tað síðan vit avrættaðu krígsbrotsmenninar frá øðrum heimsbardaga.

Nógv hampafólk í Vesturevropa munnu tó ikki leggja so nógv í um maðurin verður dripin – hann hevði ikki betur uppiborið, og fleiri av okkum munnu kanska eisini ilskast inn á, at tað ikki hvepti í onkrum peikifingri, tá Saddam varð tikin til fanga, tí um hann tá hevði verið skotin, høvdu bæði Irak og umheimurin sloppið undan hesi og øllum komandi rættarmálum, ið kunnu tykjast óneyðugar, tí úrslitið er so gott sum givið frammanundan, í hvussu so er so leingi tað er ein irakskur dómstólur og ikki ein altjóða krígsbrotsmannadómstólur, ið er settur at døma.

*Oddagrein í Dimmalætting 6. nov. 2006*

*Vegna Amnesty International Føroya deild, Margretha Nónklett, samskipari*

Amnesty International Føroya deild harmast stórliga um hugburðin, sum kom til sjóndar í oddagreinini hjá Dimmalætting 6. november 2006, har róð varð framundir, at tað kanska hevði verið best um fyrrverandi einaræðisharrin í Irak, Saddam Hussein, hevði verið skotin, tá hann varð tikin til fanga, tí so høvdu bæði Irak og umheimurin sloppið undan hesum og øllum komandi sakarmálum.

Hetta er ein sera óhugnalig niðurstøða og stríðir ímóti grundleggjandi mannarættindum og fólkaræðisligu meginregluni um, at øll hava rætt til eitt rættvíst sakarmál í samsvar við altjóða standard uttan mun til brotsverk. Tað merkir millum annað forboð móti píning og aðra grimliga viðferð og rættin til eitt rættvíst rættarmál uttan brúk av deyðarevsing. Tá vit tosa um grundleggjandi mannarættindi eru eingin undantøk, heldur ikki um talan er um Saddam Hussein.

Hugburðurin hjá Dimmalætting máar somuleiðis undan kravinum hjá irakska fólkinum um rættvísi, um at fáa brotsverkini viðgjørd og staðfest í einum sakarmáli.

Amnesty International hevði leingi virkað fyri, at Saddam Hussein varð handtikin og settur til svars fyri álvarslig brot á mannarættindi, harundir krígsbrotsverk og brotsverk móti mannaættini. Túsundavís av ofrum frá 30 ára ræðuligari viðferð hava krav uppá, at Saddam Hussein nú endiliga skal standa til svars fyri sínar gerðir.

Amnesty er ímóti deyðarevsing og tí eisini ímóti deyðarevsing fyri Saddam Hussein. At avrætta Saddam Hussein fer ikki at veita fólkinum í Irak rættvísi, men er tvørturímóti við til at rættvísgera ein revsingarhátt, sum tey sjálvi hava mótmælt, at hann hevur brúkt seinastu 25 árini. Sterkasti mátin at gera upp við fyrrverandi einaræðisharran hevði verið at dømt hann lívlanga fongsulsrevsing. Á tann hátt hevði Irak steðgað siðvenjuni hjá Saddam-stýrinum at avrætta mótstøðufólk síni og somuleiðis lagt lunnar undir eina friðarligari samfelagsmenning. Verður Saddam Hussein avrættaður, fer tað at seta arbeiðið móti deyðarevsing fleiri ár aftur.

Vit halda tí, at tað er sera hugstoytt, at oddagreinin í einum av landsins størstu bløðum rør framundir ein hugburð, sum ikki bert talar fyri at gera undantøk, tá tað snýr seg um grundleggjandi mannarættindi, men eisini sær burtur frá týdninginum av einum sakarmáli, sum skal staðfesta, hvat fór fram undir Saddam-stýrinum.

Til ber at lesa meira um sakarmálið móti Saddam Hussein á: web.amnesty.org/pages/irq-061106-news-eng

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.